# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Louisa Olsen 90 ár



Sunnudagin 11. desember verður Louisa Olsen á Ryggi í Miðvági 90 ár.

Louisa er fødd og uppvaksin á Ryggi í Miðvági. Foreldrini vóru Christian og Anna Poulsen. Pápin var ættaður av Ryggi, og vóru teir vanliga nevndir Poulsmenninir, sum helst kemur av Poulsen. Mamman var nevnd Norðskála Anna og var hon ættað av Norðskála, og var fødd Gregersen.

Louisa er nr. 6 av einum systkinaflokki upp á 13, 2 av systkjunum doyðu sum smábørn. Louisa fór sum ung genta til Sandavágs at tæna í húsi, hjá reiðara og handilsmanninum Hjalmar og konuni Margrethu Nielsen. Í síðstu helvt av tredivunum fór Louisa saman við fleiri øðrum suður til Tvøroyrar um sumrarnar at arbeiða í fiski, tá var Suðuroyggin eitt tað størsta arbeiðsplássið í landinum.

Á Tvøroyri møtti Louisa sínum komandi manni Thorvald Olsen, eisini nevndur Thorvald hjá Eiðis Tominu. Foreldrini hjá Thorvald vóru Óli Olsen, eisini nevndur Óli í Grundini og Tomina Olsen, f Andreasen. Í 1942 giftust Louisa og Thorvald og búsettust í Miðvági. Tey fingu 4 børn, Sólborg, Erna, Tordis og Torleif.

Men ikki kom alt at ganga, sum ein hevði væntað. Á vári 1949 gjørdist Thorvald sjúkur av tuberklum og lá á sanatoriunum í 4 ár. Hann doyði eftir eina skurðviðgerð í Danmark í 1954, bert 42 ára gamal.

Louisa var tá 38 ára gomul og sat einsamøll eftir við 4 børnum, sum tá vóru 14, 10, 9 og 2 ára gomul. Eftir hetta arbeiddi hon nógv í fiskaarbeiði í heimbygdini. Tá í tíðini var ongin møguleiki fyri at fáa sosiala hjálp, sum tað er nú á døgum.

Louisa hevur altíð verið guðsóttandi og trúð uppá, at hann sum øllum ræður, eisini vildi vísa henni vegin, so at hon kom at klára seg, og at geva børnunum ein virðiligan uppvøkstur.

Tá genturnar allar fluttu til Havnar at arbeiða, flutti Louisa og sonurin eisini til Havnar. Louisa fekk starv á Hotel Hafnia, har sum tvær av døtrunum starvaðust. Louisa arbeiddi á gongini, og var hon har, til hon gavst vegna aldur. Vit vita at Restorff familjan var sera glað fyri Louisu, hon var røsk og álítandi, teir nevndu hana altíð við eftirnavninum Fru Olsen.

Í 1983 var eitt ár sum rakti Louisu sera hart, hennara yngsta barn og einasti sonur doyði bert 31 ára gamal. Í 1998 doyr næstelsta dótturin 54 ára gomul. So hetta hava verið tung ár at koma í gjøgnum, men við einari sterkari trúgv á Guð, hevur hon klárað at vinna á sorg og sakni. Louisa býr einsamøll í húsum sínum í Miðvági, og klárar hon seg ógvuliga væl. Í dag hevur Louisa 9 ommubørn og 20 langommubørn. Ikki kann sigast annað enn, at øll eru sera góð við ommu og langommu. Altíð er hon sera blíð, tá vit koma á gátt. Vit gleða okkum at halda dagin saman við tær leygarmorgunin 10. desember 2005 í Miðvági.

Góða, mamma, vermamma, omma og langomma. Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 90 ára degnum og Guð vælsigni teg. Gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Ynskir øll tín familja**

◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇◇

## Jan Hentze 40 ár



Sunnudagin 11. desember fyllir Jan Hentze í Hoyvík 40 ár. Jan er havnarmaður, og er hann kanska best kendur innan flogbóltin og sum Peugeot-fjeppari um ein háls.

Annars er flogbólturin hansara hjartabarn. Hann hevur verið limur í flogbóltsfelagnum Fleyr síðan 1984 og vunnið 7 FM-heiti og óteljandi steypakappingar. Hann hevur spælt umleið 70 landsdystir fyri Føroyar, og kanska besti sigurin var Oyggjaleikirnir í 1989 í Føroyum. Síðan 2000 hevur hann spælt við 1. deild hjá Fleyr, ið er tann næstbesta deildin hjá felagnum.

Seinnu árini hevur hann fingist mest við at døma flogbóltsdystir. Hann hevur fingið sær bestu útbúgving sum flogbóltsdómari og er "Altjóða Kandidatur". Í hesum sambandi skal hann døma 7 altjóða dystir við eygleiðarum, áðrenn hann verður endaliga liðugur. Higartil hevur hann dømt tríggjar og manglar fýra.

Jan er føddur í Havn, men flutti í 1972 til Danmarkar saman við foreldrunum, Ernst Danielsen (1937-1997) úr Húsavík, og Helgu Hentze Beyer úr Havn. Skúlaárini búði hann í Danmark, og í 1984 flutti hann aftur til Føroyar at búgva, meðan foreldrini og systurin Martha, sum er tvey ár eldri, vórðu verandi í Danmark.

Fyrstu tíðina í Føroyum arbeiddi Jan hjá Húsbúna í Hoyvík, og í 1985 koyrdi hann eitt stutt tíðarskeið lastbil hjá Júst Sivertsen. Eisini koyrdi hann hjá P/F Poul Hansen, áðrenn hann í september 1986 fór at arbeiða á goymsluni á bilasøluni hjá Vilhelm Nielsen í J. Broncksgøtu. Eftir tveir mánaðir fekk hann bjóðað læruplass, og fór í læru har sum goymslumaður tann 1. januar 1987. Tá hann hevði lært í eitt ár, varð hann settur sum leiðari á goymsluni. Hann var útlærdur í 31. desember 1989 og arbeiddi har til 31. desember 1993.

Í eitt ár, frá 1. januar 1994 til 1. januar 1995, arbeiddi hann á Bilasøluni hjá Øssuri Johannesen í Hoyvík Síðan fekk hann boðið starv sum leiðari á Statoil í Gundadali. Har var hann í hálvfjórða ár, til hann fekk starv hjá P/F Meinhardt Arge sum bilasølumaður við ábyrgd av Peugeot-bilunum.

Síðan 1. september 2003 hevur Jan verið goymsluleiðari í fyritøkuni, sum nú hevur skift eigara og aftur fingið gamla navnið, Auto Service.

Eftir arbeiðstíð koyrir Jan ofta hýruvogn og onkran leigitúr við bussi. Hann er limur í Býrsumúla og hevur skotið seg til eitt FM-heiti í Skeet. Seinastu tvey árini hevur hann eisini veriðvenjari hjá einum dreingjaliði hjá Fleyr (dreingir 14 ár).

Jan er giftur Rúnu, f. Madsen, tey eiga tveir dreingir: Rói, 13 ár, og Dávið, 5 ár.

**-red**

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við Axel **Haraldsen**, Tórshavn, ættaður úr Sørvági, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum leygardagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin klokkan 13. Tey, sum ynskja at minnast Axel kunnu senda eina gávu til Javna. Konto í peningastovunum.

**Christian Joensen**, ættaður úr Skopun, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 7. desember, 79 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum sunnukvøldið kl. 18.00

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mánadagin kl. 13.00

**Karin Joensen** úr Fuglafirði, andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi mikudagin 7. desember, 100 ára gomul.

Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík fríggjadagin klokkan 17.

Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju leygardagin klokkan 13.

Tey, sum vilja minnast Karina, kunnu lata Eysturoyar, Røktar- og Ellisheimi eina peningagávu.

Gjørt verður kunnugt, at okkara kæra

**Edith Marie Dam**
búsitandi í Sandavági

andaðist í heiminum hósdagin 8. desember, 91 ára gomul.
Jarðarferðin verður sunnudagin kl. 14.00 úr Sandavágs kirkju.

*Familjunnar vegna*
**Enok**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu tá kæri pápi, verfaðir, abbi og bróðir okkara

**Sofus Andreasen**
Tórshavn

doyði og varð jarðaður.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur til Barnalegurnar í Grønlandi.

Tøkk øll tit, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og við ervið.
Takk til talarar, berarar, organistar, Ebenezer-kórið, sangarar á grøvini og gravarar.
Tøkk øll tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Hjartaliga takk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Jan, Svend Arni og Anna Maria**